Kvinnur ráðharrar í Iran

Iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, sigur, at minst tríggjar kvinnur fáa sæti í teirri nýggju stjórnini. Talan er um eina stóra broyting, tí heldur forsetin orð, er tað fyrstu ferð síðani kollveltingina í 1979, at kvinnur fáa ráðharrastørv í Iran. Í einari søðu í gjár segði Ahmadinejad, at hann hevur gjørt av at velja eina kvinnu til heilsumálaráðharra og eina aðra til ráðharri fyri vælferð og trygd. Hann segði, at hann fer at tilnevna minst eina kvinnu afturat í stjórnina. Farrokhroo Parsay, sum var uttanríkisráðharri frá 1968 til 1977, var tann fyrsta kvinnan, sum var ráðharri í Iran. Aftan á kollveltingina í 1979 bleiv hon tikin og ákærd fyri svik. Hon varð tikin av døgum í 1980.

Berlusconi ímóti mafiuni

Forsætisráðharrin í Italia, Silvio Berlusconi, kunngjørdi um vikuskiftið, at hann og stjórnin hava sett sær fyri at fullføra eitt átak ímóti tí skipaða kriminalitetinum í landinum. Undir valstríðnum í fjør lovaði Berlusconi at tryggja lóg og landaskil, og tað lyftið var við til at tryggja honum sigurin. Sambært Roberti Maroni, innanríkisráðharra ætlar stjórnin at leggja hald á ognir hjá mafialimum, eins og herurin framvegis skal vera á varðhaldi í býunum. Ráðharrin vísti á, at tey tiltøk, sum stjórnin hevur framt, hava havt við sær, at kriminaliteturin er minkaður 14 prosent, síðani stjórnin tók við.

8.000 toskar deyðir í

Toskaalingin í Føroyum, sum annars hevur sæð so lovandi út, hevur um dagarnar verið fyri einum bakkasti. Tá ein pumpa í alibrúkinum í Hvalba steðgaði fyri seks døgum síðan, doyðu 8.000 toskar, sum skuldu takast í heyst

ALING
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Toskaalingin hjá Faroe Codfarm í Hvalba hevur verið fyri einum keðiligum bakkasti. Hetta hendi fyri seks døgum síðan, tá ein pumpa í alibrúkinum steðgaði og fleiri túsund toskar, sum skuldu takast til sláturs í heyst, doyðu.

Richard Rognsøy, stjóri í Faroe Codfarm, váttar, at út við 8.000 toskar eru deyðir.

Doyðu av ilttroti

Toskaalingin í Hvalba fer fram í tveimum stórum kørum, sum standa uppi á landi í Nesi í Hvalba.

Sjógvur verður pumpaður upp í kørini og rennur síðan í havið aftur. Soleiðis hevur fiskurin fingið nýggjan sjógv og ilt alla tíðina.

Men fyri seks døgum síðan hendi tað, sum ikki skuldi henda. Tá steðgaði ein pumpa, og hetta førdi til, at út við 8.000 toskar doyðu av ilttroti.

Stjórin í Faroe Codfarm, Richard Rognsøy, sigur, at nú hesir toskarnir eru deyðir, svimja umleið 22.000-23.000 toskar eftir í teimum báðum kørunum í Hvalba.

- Hetta er alt fiskur, sum skuldi takast til heystar, og nú verða so hesir fiskarnir færri at taka.

Hann sigur, at miðalvektin á fiskinum í kørunum í Hvalba liggur um stívliga tvey kilo, harav teir minstu viga minni og teir størstu munandi meira.

Richard vil ikki seta tøl á, hvussu nógv deyði fiskuri er verdur í krónum og oyrum, men rokna vit teir umleið 8.000 fiskarnar um til kilo, er talan um 16 tons.

Hann vísir á, at kiloprísurin er umleið 20 krónur í miðal fyri heilan fisk og umroknað til krónur, er talan soleiðis um eitt virði av 320.000 krónum.

Enn er fíggjarligi missurin ikki endaliga uppgjørdur.

Back-up skipan

Richard Rognsøy sigur, at fiskurin í alibrúkinum í Hvalba er tryggjaður, men tað vil undir slíkum umstøðum altíð vera soleiðis, at eitt tílíkt bakkast er óheppið.

Hann sigur, at Faroe Codfarm fer at tryggja pumpuskipanina betri, soleiðis at teir alla tíðina kunnu hava eina eykatrygd.

- Vit noyðast soleiðis at fáa okkum eina back-up skipan, har ein eykaskipan tekur við og byrjar at pumpa, um virknað pumpuskipanin svíkur, sigur stjórin í felagnum.

Richard Rognsøy er stjóri í Faroe Codfarm í Hvalba



Tey 16 tonsini av toski, sum doyðu í Hvalba herfyri, hava eitt søluvirði av umleið 320.000 krónum

Alt takast

Richard Rognsøy sigur, at allur fiskurin, sum gongur í báðum kørunum í Hvalba, verður tikin til heystar, og felagið hevur keyparar, sum vilja hava henda fiskin.

- Fiskurin, sum verður tikin fyrst, vigar upp ímóti 3,5 kilo, sigur hann.

Faroe Codfarm arbeiðir annars við at útbyggja toskaalingina við seks nýggjum og nógv størri kørum enn teimum verandi.

Stjórin váttar, at tað er ikki lætt at fáa íleggjarar í tíðum sum hesum, men felagið arbeiðir framvegis við hesi ætlan.

Tá fiskurin, sum nú gongur eftir í kørunum, er tikin og seldur, fær felagið nakað av kapitali at arbeiða við.

- Tey bæði kørini, vit hava í løtuni, eru umleið 650 rúmmetrar hvørt. Hinvegin eru tey seks kørini, sum vit ætla at seta upp her suðuri, 1900 rúmmetrar hvørt, sigur Richard Rognsøy, stjóri í Faroe Codfarm.

Tvey feløg

Í Føroyum fer toskaaling fram á tveimum støðum.

Í Hvalba verður fiskurin aldur í kørum, og á Árnafirði fer aling fram úti á vánni í aliringum, soleiðis sum vit kenna tað frá laksa- og sílaaling.

Føroysku toskaalararnir ala bæði tosk, sum hevur